# HEILSANIR



Eg og foreldur míni takka øllum tykkum, sum gleddu meg á fermingardegi mínum 13. apr. 2003.
**Heilsan Jonhard Kjærbo, Sandvík**



**Góði Johan**
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum. Harrans signing í framtíðini. Eisini ein heilsan til Rana og Kristinu. Vit elska tykkum.
**Ynskja omma, abbi, Randi og Ólavur**




**Hey Hákun**
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum 27. sept.
**Ynskja mamma og babba**



**Góða elskaða kona og mamma**
Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Vit elska teg.
**Heilsan maður og børn**



**Góða Kristina**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 26. sept.
**Ynskja omma og abbi á Landavegnum**



Hvat er tað ikki stuttligt at fáa pipar. Gott klárað.
**Heilsan eisini eg**



Nú fær hesin bioanalytikarin pipar, ótrúligt. Gott man ikki er gamal drongur.
**Ynskir ungur drongur**



**Góða Kristina**
Tillukku við 1 ára degnum.
**Ynskir stórasysti**



**Hallo Boss**
Gleða okkum til ballið í kvøld. Tillukku við degnum.
**Ynskja vit á Høgukvíggj**



**Góði Leif**
Hjartaliga tillukku við degnum. Alt tað besta í framtíðini.
**Kærar heilsanir myndatakarin**



**Skál**
Eg vóni, at ballið verður líka gott, sum hetta var.
**Heilsan myndatakarin**



Hví snerkir tú soleiðis.
**Heilsan Spurin**



**Góðu omma og abbi**
Hjartaliga tillukku við 40 ára døgunum. Takk fyri at tit eru so góð við okkum.
**Ynskja Hilmar og Sólja**



**Mina og Remi**
Tillukku við 40 ára døgunum. Ikki sæst aldur enn. Takk fyri hugnaligar løtur.
**Ynskir myndatakarin**



Hjartaliga tillukku við 30 ára degnum.
**Heilsan eg**



**Kenna tit hendan?**
Ja, hendan „dullan“ verður piparsveinur um vikuskiftið, man hann fara at vera líka fínur í kvøld?
**Heilsan ein, ið gleðir seg til í kvøld**



# TILTØK

**Gudstænastur 28. sept.**
*15. sunnudag e. trinitatis*
Vesturkirkjan: Sverri Steinhólm og Flemming Burgdorf kl. 11, altargongd
Havnar kirkja: Erland Beder kl. 11
Nólsoy: Sonja Klein kl. 12
Kollafjørður: Bjarni Bæk kl. 11
Gøta: Martin R. Jacobsen kl. 11
*Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri sunnudagsskúlarnar hjá Heimamissiónini*
Skála: kl. 11 *(barnakórið)* Jóna Thomsen og Jógvan Fríðriksson
Rituvík: Meinard Bjartalíð kl. 11
Leirvík: Uni Næs kl. 11
*Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri sunnudagsskúlan*
Selatrað: Heri Joensen kl. 11
Tjørnuvík: Mogens T. Christensen kl. 12
Bøur: Inga Poulsen Dam kl. 11. Vága Streingjakór syngur
Viðareiði: Elsa Funding kl. 11, (útvarp.)
Sandur: Jákup R. Hansen kl. 12
Hvalba: Ólavur Rasmussen kl. 12.30
Tvøroyri: Jónsvein Bech kl. 11
Øravík: Jónsvein Bech kl. 17
Porkeri: Patrick de Neergaard kl. 12
*Í Oyndarfjarðar, Selatraðar og Sjóvar kirkju gongur talvan fyri sunnudagsskúlan*
**Mánakvøldið 29. sept. kl. 20.30 í Glyvra kirkju:**
Musik-andakt. Kingobólkurin úr Tjørnuvík syngur.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 verður morgunmøti. Barnansing verður samstundis. Kl. 11.30 verður samvera við drekkamunni. Kl. 12.00 verður sunnudagsskúli og á møtinum, sum eisini er kl. 12.00, talar Óli á Grømma Jacobsen frá New Tribes Mission.
www.hebron.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00: Møti. Eingin sunnudagsskúli, men familjutími kl. 17.00. Drekkamunnur aftaná.
Øll eru vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus og framtíð okkara. Kl. 11.00: Gudstænasta og kvøldmáltíð, J.V. Danielsen.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3,*
Sunnudagin sunnudagsskúli kl. 14.00. Møti kl. 18.00, v/ Leo-Hans Mikkelsen.
Mánakvøldið bønarmøti kl. 20.30.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17.00: Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Rúna Rasmussen.
Kl. 11.30: Barnagudstænasta.
Kl. 16.00: Samkomufundur.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarskúlin.
Mikukvøldið kl. 19.00: Delli.
www.filadelfia.fo

**Samkoman Rhema**
Sunnudagin verður møtið og sunnudagsskúlin flutt til kl 17.
Eisini verður kaffi.
Øll eru vælkomin
*Staravegur 5*
www.rhema.fo

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00: Breyðbróting, kl. 12.00: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Evangeliskt møti, kl. 21.00: Útimøti.
Mikud. kl. 17.30: AWANA
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Messa í Mariukirkjuni.
Leygardag kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11: Hámessa v/ Biskup Lukas de Hovre í Mariukirkjuni. Sunnudagin . 14: Sunnudagsskúli.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15 til 18.
Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar.
Tú ert vælkomin at koma við bønarevnum (skrivliga), ið verða løgd framman fyri tað heilaga Sakramentið. *»Ver her og vak við mær. Vak og bið!«*

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 er evnið: "Hví og hvussu skal eg lesa Bíblina?" og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 er evnið: "Visión fyri Ballerup". Á báðum møtinum talar Andrew Berghamar.
Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldri á báðum møtinum.Sunnudagsskúlin er kl. 12.
Drekkamunnur er millum bæði møtini.
Týskvøldið kl. 20 samlast Húsbólkarnir.
www.livdin.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin 29. sept. kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Árant Johannesen, trúboðara.
Týsdagin 30. sept. kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnumorgunin kl. 10.00: Møti við Agnar Reinert, evni: tabernakli. Um kvøldið kl. 18.00: Evangeliskt møti v/ Agnar Reinert.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13.00: Sunnudagsskúli. Sunnudagin kl. 17.00: Møti.

**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
Leygardagin kl. 16.00–18.30: Foreldur við børnum hittast.
Leygardagin kl. 19.30–22.00: Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Harry Hansen.

**Vestmanna Missiónshús**
Leygarkvøldið kl. 20.00: Felagsmøti við Regin Olsen úr Havn, Ólavi Jacobsen úr Hósvík og Streingjakórinum í Vágum.
Sunnudagin kl. 14.30: Sunnudagsskúli, kl. 19.00: Møti við Regin Høgnesen úr Leirvík.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti v/ Magnus Paula Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Standi fastir í trúnni, verið manniligir, verið sterkir! Alt hjá tykkum verið gjørt í kærleika!«*
1. Kor. 13–14

Er tað trupult at gerast sterkur, er tað eisini trupult at brúka styrkina rætt. Nøkur menniskju halda, at tað trupla er at tjena pengar. Ofta síggja vit at tað er ikki minni trupult at brúka teir rætt. Á sama hátt er við styrkini. Og eitt verða vit mint um í øllum lívsins viðurskiftum, at makt, styrki og kreftir verða av sonnum brúkt skeivt, um ikki aftan fyri býr kærleiki, eitt sinnalag, sum ikki søkir sítt egna.

Um vit skulu fáa Guðs styrki, mugu vit fáa hana fyri at brúka hana. Í Guðs ríki – ja, í andans verð allastaðni – er tað at taka ímóti, tað sama sum at brúka. Tað, ið eg ikki brúki, havi eg í veruleikanum ikki tikið ímóti. Um vit soleiðis skulu kunna fáa og brúka Guðs kraft, er tann kærleiki, ið ikki søkir sítt egna, hin neyðuga fyritreytin.

Saman eiga vit at takka Guði fyri, at vit sjálv ikki skulu skapa styrkina. Vit boyggja høvur okkara í undrandi tilbiðjan um, at vit ikki skulu noyða Guð at geva hana. Vit eiga at samlast í longsli til Guðs eftir, at vit mugu uppfylla tær treytir, sum verður víst á við orðunum: Bøn, trúgv, lýdni, kærleiki. Tað er vegurin til at fáa Guðs gávur, eisini til at fáa styrkina ella kraftina frá tí høga. Amen!

**John S. Myllhamar**

**Karmel, Eiði**
Møti verður sunnukvøldið 28. sept. kl. 19.00 v/ Jónhildu og Gullak Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 11.00: Familjugudstænasta í kirkjuni við Jógvani presti og Jónu Thomsen, sunnudagsskúlaráðgeva. Barnakórið syngur. Eingin sunnudagsskúli kl. 13.30.
Møti kl. 19.00 við Niels J. Nielsen, trúb., í meinigheitshúsinum.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Gøtu**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20.00 við Marjun og Andrass Biskopstø. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sjómanskvinnuringarnir**
á Skála, Selatrað, Strondum Skálabotni savnast mánakvøldið kl. 19.00 uppi í bygdarsalinum í høllini á Skála. Allar kvinnur, yngri sum eldri, eru vælkomnar við.

**Sjómanskvinnuringurin**
í Runavík kemur saman mánakvøldið kl. 19.30 á Sjómansheiminum. Allar kvinnur eru vælkomnar at verða við.

**Missiónshúsið Thabor, Toftir**
Í kvøld kl 20.00 hava vit sang og vitniløtu,
har ung skipa fyri. Tú ert hjartaliga vælkomin!

**Missiónshúsið í Leirvík**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00 v/ Vagn Foldbo. Barnaansing verður. Ungdómsmøti kl. 21.00 v/ Øssur Steinhólm.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Heimasíða: www.jesus.fo

**Keldan, Skálafirði**
Sunnudagin kl. 11.00: Samkomudagur.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missiónshúsið á Selatrað**
Sunnudagin kl. 17.00 verður møti v/ J. Myllhamar.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 17.00.
Tim 5 verður mánadagin kl. 17.30 og ungdómsmøti kl. 20.00.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl.11.00: Morgunmøti, kl.16.00: Samkomufundur.
Vælkomin í Betania

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Kl. 17.30: Bønar- og lovsangsløta. Kl. 18.00: Møti. Innsavnan verður.
Mánadagin kl. 17.00 koma børnini saman, 1.–6. fl.
Kl. 19.00 kemur ungdómurin saman, 7 fl. og eldri.
Mikukvøldið 30. sept. kl. 20.00: Bíbliutími.
Hjartaliga vælkomin.

**Saron, Viðareiði**
Evangelisk møti verða fríggjakvøldið 26. sept. og leygarkvøldið 27. sept. kl. 20.00 og sunnudagin 28. sept. kl. 18.00. Evnið verður Filippibrævið. Osvald Kjærbo talar og ung úr Betesda syngja og vitna. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane**
*á Brekku 19, Klaksvík*
Sunnukvøldið kl.18.00 er møti. (barnaansing er undir møtinum).
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Norðoyggjum**
Sunnudagin kl.14.00: Sunnudagsskúli. Kl.17.30: Bønarløta. Kl. 18.00: Møti v/ Kristiliga lurtara/síggjarafelag.
Kl. 21.00: Ungdómsmøtið.
Øll eru hjartaliga vælkomin
www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 20.00: Møti.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Bygdarhúsið í Lopra**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Porkeri**
Kvinnumøti verður týskvøldið kl. 20.

**Allir sjómanskvinnuringarnir í Suðuroynni**
savnast í missiónshúsinum í Hvalba leygardagin 27. sept. kl. 18.00. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Allir sjómanskvinnuringarnir í oynni savnast í missiónshúsinum í Hvalba leygardagin 27. sept. kl. 18.00. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Sunnudagin kl. 18.00 verður sjómansmøti við Torleifi Johannesen, sjómanstrúboðara. Filmur frá sjólívinum verður vístur. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Jóannes og Sigrid Mortensen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møtið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnukvøldið kl. 20.00 verða møti í Porkeris skúla. Símun Absalonsen, Theodor, Jóhannus og Harald fara at tala, syngja og vitna. Astrid og Lau fara at siga frá um Alfa skeið, sum byrjar í oktober. Leygardagin kl. 14.00 verður undirvísing í Café One Way. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vági**
Leygarkvøldið kl. 20.00: Bøn- og lovsangsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Evangeliskt møti, har nýggju leiðararnir Irena og Eyðun Christiansen verða innsettir. Eftir møtið verður drekkamunnur.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00: Breyðbróting, kl. 13.30: Sunnudagsskúli, k1. 18.00: Evangeliskur fundur.
Mánadagin kl. 20.00: Bønararfundur.
Ónsdagin kl. 20.00: Uppbyggingarfundur.

**Sion, Vági**
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøld kl. 21.00: Bønarmøti.
Bønartønastan á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 29. september*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Myndaveving á loftinum. Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl,dart og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin, tlf. 316491
*Týsdagin 30. september*
kl. 10-12.00 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja saman við skúlabørnunum og gestum úr Aberdeen. Knút Olsen spælir
kl. 14.30 Tá bretar hersettu Føroyar. Elin Mortensen
*Mikudagin 1. oktober*
kl. 10-13.00 Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00 Døgurði saman við gestum úr Aberdeen. Til ber at koma sum gestur. Tilmelding mánadag á tlf. 316491
kl. 14.00 Túrur úr á Blindastovnin. Tilmelding á tlf. 316491
*Hósdagin 2. oktober*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-12 Gera prýðislutir í kjallaranum saman við gestum úr Aberdeen
kl. 14-17.00 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17.00 Hugnaløta við gestum úr Aberdeen
*Fríggjadagin 3. oktober*
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Hourlou
kl. 12.00 Døgurði
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Javni í gongugøtuni**
Í sambandi við langan leygardag í miðbýnum 27. sept, verður Javni í gongugøtuni. Kl. 11.00 fer Frítíðarklubbin at selja kakao, bollar og ballónir, og kl. 14.00 fer Beate L. Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd, at halda røðu við heitinum “Havnin fyri øll”. Aftaná fara M’as Blues Band at syngja og spæla. Møguleiki er eisini at svara spurningum og vinna eina x-box ella fløgur av M’as. Øll eru vælkomin